MENTANARGRUNNUR LANDSINS

# Starvsskipan

## fyri nevnd Mentanargrunn Landsins

Við heimild í § 2, stk. 3, í kunngerð nr. 109 frá 21. september 2000, sum broytt við kunngerð nr. 2 frá 6. januar 2025 verður ásett soleiðis:

### Fundarskipan
### § 1.

Forfólkið er fundarleiðari. Um forfólkið ikki er á fundi, er varaforfólkið fundarleiðari.

Forfólkið og umsitingin fyrireika nevndarfundirnar og geva limunum fundarboð við dagsskrá og hjáløgdum neyðugum skjølum í seinasta lagi eina viku frammanundan fundinum. Um nevndin samtykkir tað, kunnu eisini onnur mál uttan fyri ásettu dagsskrá viðgerast á fundi.

Aftan á hvønn nevndarfund verður skrivað fundarfrásøgn um viðgjørd mál og tiknar avgerðir. Ein minniluti kann krevja sína støðu tilskilaða í fundarfrásøgnini. Fundarfrásøgnin verður send limum. Fundarfrásøgnin verður send varalimum, sum vóru á fundi. Á nevndarfundi verður fundarfrásøgnin løgd fram til góðkenningar og undirskrivað av teimum, ið vóru á fundinum.

Um limi berst frá at møta á fundi, skal boðast frá til forfólkið skjótast gjørligt. Tað áliggur tá umsitingini at geva varaliminum fundarboð. Um hvørki limur ella varalimur fáa møtt á fundi, skal liminum/varaliminum verða givið høvi til, skrivliga ella á annan hátt, at framføra síni sjónarmið um mál á dagsskránni.

Allar avgerðir verða tiknar á nevndarfundi. Tó kann nevndin í serligum førum geva forfólkinum heimild at taka avgerð nevndarinnar vegna. Nevndin er viðtøkufør, tá ið í minsta lagi 3 nevndarlimir ella varalimir eru á fundi. Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er atkvøða forfólksins avgerandi.

Nevndarlimir kunnu ikki søkja um listafólkalønir. Tó ber til at søkja um starvslønir ella stuðul til verkætlanir. Heitt verður á LISA um at kunna síni umboð um hetta, áðrenn nevndarlimur verður tilnevndur í grunninum. Varalimur verður kallaður inn, um nevndarlimur søkir starvsløn.

### Viðgerð av umsóknum
### § 2.

Nevndin kann senda umsóknir til ummælis hjá serkønum ella boðsenda serkønum, tá hetta verður hildið neyðugt fyri málsviðgerðina.

Avgerðir skulu verða grundgivnar, og umsøkjari skal verða kunnaður um grundgeving nevndarinnar.

MENTANARGRUNNUR LANDSINS

**Starvsløn**
**§ 3.**

Endamálið við starvslønunum er at geva listafólkum og øðrum, ið takast við mentanarligt virksemi, arbeiðsnáðir í eitt ávíst tíðarskeið at starvast burturav við listaligum ella øðrum mentanarligum arbeiði.

Starvsløn verður latin umsøkjara við støði í verkevni ella verkætlan, sum lýkur krøvini í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins, § 1, og kunngerð um Mentanargrunn Landsins, sum seinast broytt við kunngerð nr. 2 frá 6. januar 2025, og sum nevndin í Mentanargrunninum metir hava listalig ella faklig dygdareyðkenni.

Starvslønir kunnu verða latnar soleiðis:

1. Ein starvsløn galdandi í 3 ár
2. Tvær starvslønir galdandi í 1 ár
3. Starvslønir galdandi í 1 til 6 mánaðir

Nevndin ger sjálv av, hvussu nógvar starvslønir verða latnar, tó skal samlaða útreiðslan til starvslønir fyri eitt játtanarár ikki verða meira enn helmingurin av samlaðu játtanini til Mentanargrunn Landsins.

Starvsløn verður útgoldin mánaðarliga og svarar í upphædd til læraraløn á fólkaskúlans lønarstigi 21, stig 1, umframt 15% í eftirløn.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin frágreiðing, eftir at tiltakið er av, tó í seinasta lagi 1. apríl eftir játtanarárið. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn. Hevur starvslønarmóttakari fingið annan stuðul, letur hann inn roknskap fyri hendan partin eftir vanligu reglunum.

Starvslønir verða latnar eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins, á umsóknarblað grunsins.

Lýst verður alment eftir umsóknum til starvslønir 2 mánaðir áðrenn umsóknarfreistina.

**Listafólkaløn**
**§ 4.**

Endamálið við listafólkalønum er at bøta um korini hjá yrkislistafólkum, sum í játtanarskeiðnum burturav arbeiða við list.

Listafólkalønir verða latnar við støði í verkevni ella verkætlan, sum lýkur krøvini í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins, § 1, og kunngerð um Mentanargrunn Landsins, sum seinast broytt við kunngerð nr. 2 frá 6. januar 2025, og sum nevndin í Mentanargrunninum metir hava listalig ella faklig dygdareyðkenni. Tó kunnu listafólkalønir verða latnar við støði í listaligari fakligheit ella royndum hjá umsøkjara.

Nevndin fyri Mentanargrunn Landsins setir faknevndir, sum viðgera umsóknir um listafólkalønir og gera tilmæli til nevndina fyri Mentanargrunn Landsins. Faknevndirnar skulu verða mannaðar við fakfólkum innan ávísu listaøkini.

Tey, ið fáa listafólkaløn, skulu í útgangsstøðinum arbeiða í minsta lagi í trý ár. Sama listafólk hevur møguleika fyri at fáa játtað listafólkaløn tríggjar ferðir. Yrkislistafólk kunnu ikki røkja annað fast starv, meðan teimum verður latin listafólkaløn. Tey kunnu tó hava inntøkur av sínum skapandi virksemi, meðan tey fáa listafólkaløn.

Listafólkalønin verður útgoldin mánaðarliga og svarar í upphædd til læraraløn á fólkaskúlans lønarstigi 21, stig 1, umframt 15% í eftirløn.

Listafólkalønarmóttakari skal lata Mentanargrunninum eina ávegis frágreiðing á hvørjum árið og eina frágreiðing, tá trý ára skeiðið er av. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn. Hevur listafólkalønarmóttakari fingið annan stuðul, letur hann inn roknskap fyri hendan partin eftir vanligu reglunum.

Farloyvi, uttan løn, kann verða játtað í sambandi við sjúkramelding og barnsburð.

Yrkislistafólk eru tey, sum hava lokið viðurkenda yrkisfakliga útbúgving ella hava samsvarandi royndir innan listaliga økið.

Listafólkalønir verða latnar eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins, á umsóknarblað grunsins.

Lýst verður alment eftir umsóknum til listafólkalønir 2 mánaðir áðrenn umsóknarfreistina.

**Íverksetanarstuðul**
**§ 5.**

Endamálið við íverksetanarstuðlinum er at stuðla einstaka skapandi yrkislistafólkinum, serliga ungum listafólki. Íverksetanarstuðulin skal lætta um hjá evnaríkum listafólkum at koma víðari við sínum skapandi listaarbeiði.

Íverksetanarstuðul verður latin við støði í verkevni ella verkætlan, sum lýkur krøvini í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins, § 1, og kunngerð um Mentanargrunn Landsins, sum seinast broytt við kunngerð nr. 2 frá 6. januar 2025, og sum nevndin í Mentanargrunninum metir hava listalig ella faklig dygdareyðkenni.

Nevndin ger sjálv av, hvussu nógvir íverksetanarstuðlar verða latnir, tó skal útreiðslan til íverksetanarstuðul ikki verða meira enn 10% av samlaðu játtanini til Mentanargrunn Landsins. Siðvenja hevur verið at játta stuðul til í mesta lagi 4 listafólk um árið.

Íverksetanarstuðulin er 75.000 kr. árliga. Íverksetanarstuðul kann bert latast sama persóni eina ferð og í mesta lagi fyri 2 ár.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin frágreiðing, eftir at tiltakið er av, tó í seinasta lagi 1. apríl eftir játtanarárið. Gongur verkætlanin yvir fleiri ár, verður frágreiðing at meta sum ávegis frágreiðing, sum verður latin Mentanargrunninum á hvørjum ári. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn. Hevur stuðulsmóttakari fingið annan stuðul, letur hann inn roknskap fyri hendan partin eftir vanligu reglunum.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin roknskap eftir hesum reglum:

Roknskapir, har játtanin er 50.000 kr. og upp til 100.000 kr., skulu hava átekning.
Áteknaður roknskapur krevur, at ein uttanveltaður persónur váttar, at roknskapurin er settur upp sambært fyriliggjandi skjølum.

Íverksetanarstuðul verður latin eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins, á umsóknarblað grunsins.

Lýst verður alment eftir umsóknum til íverksetanarstuðul 2 mánaðir áðrenn umsóknarfreistina.

**Týðaragrunnur Landsins**
**§ 6.**

Endamálið við týðaragrunninum er at stuðla týðing úr fremmandum málum til føroyskt.

Stuðul til týðingar verður latin við støði í verkevni ella verkætlan, sum lýkur krøvini í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins, § 1, og kunngerð um Mentanargrunn Landsins, sum seinast broytt við kunngerð nr. 2 frá 6. januar 2025, og sum nevndin í Mentanargrunninum metir hava listalig ella faklig dygdareyðkenni.

Týðingar til føroyskt verða sum meginregla raðfestar framum onnur mál, og stuðul kann latast bæði til verkætlanir og sum starvsłønir.

Starvslønir kunnu verða latnar soleiðis:

1. Ein starvsløn galdandi í 3 ár
2. Tvær starvslønir galdandi í 1 ár
3. Starvslønir galdandi í 1 til 6 mánaðir

Nevndin ger sjálv av, hvørjar umsóknir verða stuðlaðar, og hvussu stórur stuðulin skal vera í hvørjum einstøkum føri.

Starvsløn verður útgoldin mánaðarliga og svarar í upphædd til læraraløn á fólkaskúlans lønarstigi 21, stig 1, umframt 15% í eftirløn.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin frágreiðing, eftir at tiltakið er av, tó í seinasta lagi 1. apríl eftir játtanarárið. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn. Hevur starvslønarmóttakari fingið annan stuðul, letur hann inn roknskap fyri hendan partin eftir vanligu reglunum. Gongur verkætlanin yvir fleiri ár, verður frágreiðing at meta sum ávegis frágreiðing, sum verður latin Mentanargrunninum á hvørjum ári.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin roknskap eftir hesum reglum:

Roknskapir, har játtanin er 50.000 kr. og upp til 100.000 kr., skulu hava átekning.
Áteknaður roknskapur krevur, at ein uttanveltaður persónur váttar, at roknskapurin er settur upp sambært fyriliggjandi skjølum.

Roknskapir, har játtanin er 100.000 kr. ella meir, skulu verða grannskoðaðir.
Grannskoðaður roknskapur krevur at verða grannskoðaður av góðkendum grannskoðara, og at avritið av grannskoðanarprotokollini er hjálagt.

Stuðul verður latin eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins, á umsóknarblað grunsins.

**Stuðul til film**
**§ 7.**

Endamálið við stuðulsjáttanini er at framleiða og menna føroyskan film við denti á fiktiónsfilm, heimildarfilm og listafilm.

Stuðul verður latin við støði í kunngerð nr. 3 frá 6. januar 2025 um stuðul til film.

Mentanargrunnur Landsins setir eina faknevnd fyri film eftir tilmæli frá Felagnum Føroysk Filmsfólk og Filmshúsinum, ið mæla til hvør sín lim og hvør sín varalim.

At meta um umsóknir og gera tilmæli til Mentanargrunn Landsins setir Mentanargrunnur Landsins tveir filmsráðgevar og tvey varafólk eftir tilmæli frá eini faknevnd fyri film.

Faknevndin fyri film eftirmetir hvørt umsóknarumfar saman við filmsráðgevunum og Mentanargrunni Landsins.

Mentanargrunnur Landsins ger av hvør kann fáa stuðul til film, og hevur eftirlit við, at stuðulin til film verður nýttur til ætlað endamál. Stuðul verður ikki latin almennum stovnum ella almennum partafeløgum, grunnum o.tíl.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin frágreiðing og roknskap í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at verkætlanin er liðug. Gongur verkætlanin yvir fleiri ár verður frágreiðing at meta sum ávegis frágreiðing, sum verður latin Mentanargrunninum á hvørjum ári. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin roknskap eftir hesum reglum:

Roknskapir, har játtanin er minni enn 50.000 kr., skulu skjalprógva útreiðslurnar.

Roknskapir, har játtanin er 50.000 kr. og upp til 100.000 kr., skulu hava átekning.
Áteknaður roknskapur krevur, at ein uttanveltaður persónur váttar, at roknskapurin er settur upp sambært fyriliggjandi skjølum.

Roknskapir, har játtanin er 100.000 kr. ella meir, skulu verða grannskoðaðir.
Grannskoðaður roknskapur krevur at verða grannskoðaður av góðkendum grannskoðara, og at avritið av grannskoðanarprotokollini er hjálagt.

Stuðul verður latin eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins, á umsóknarblað grunsins.

Lýst verður alment eftir umsóknum við einari umsóknarfreist upp á í minsta lagi 6 vikur.

**Føroyskt tilfar til børn og ung**
**§ 8.**

Endamálið er at stuðla framleiðslu av føroyskum listaligum tilfari, eitt nú framleiðslu av tónleikatilfari og øðrum mentanarligum tilfari, sum kann íbirta og menna listaligu og málsligu evnini hjá børnum og ungum í einum føroyskum høpi.

Stuðul verður latin við støði í kunngerð um Mentanargrunn Landsins, sum seinast broytt við kunngerð nr. 2 frá 6. januar 2025 um stuðul føroyskt tilfar til børn og ung.

Stuðul til "Føroyskt tilfar til børn og ung" kann latast bæði til verkætlanir og sum starvsłønir.

Starvsłønir kunnu verða latnar soleiðis:

1. Ein starvsløn galdandi í 3 ár
2. Tvær starvsłønir galdandi í 1 ár
3. Starvsłønir galdandi í 1 til 6 mánaðir

Nevndin ger sjálv av, hvørjar umsóknir verða stuðlaðar, og hvussu stórur stuðulin skal vera í hvørjum einstøkum føri.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin frágreiðing, eftir at tiltakið er av, tó í seinasta lagi 1. apríl eftir játtanarárið. Gongur verkætlanin yvir fleiri ár, verður frágreiðing at meta sum ávegis frágreiðing, sum verður latin Mentanargrunninum á hvørjum ári. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn. Hevur stuðulsmóttakari fingið annan stuðul, letur hann inn roknskap fyri hendan partin eftir vanligu reglunum.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin roknskap eftir hesum reglum:

Roknskapir, har játtanin er 50.000 kr. og upp til 100.000 kr., skulu hava átekning.
Áteknaður roknskapur krevur, at ein uttanveltaður persónur váttar, at roknskapurin er settur upp sambært fyriliggjandi skjølum.

Roknskapir, har játtanin er 100.000 kr. ella meir, skulu verða grannskoðaðir.
Grannskoðaður roknskapur krevur at verða grannskoðaður av góðkendum grannskoðara, og at avritið av grannskoðanarprotokollini er hjálagt.

Stuðul verður latin eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins, á umsóknarblað grunsins.

**Verkætlanir og mentanarligt virksemi sum heild**
**§ 9.**

Endamálið við stuðulsjáttanini er at styðja starv fyri føroyskum mentanarlívi; føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum. Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og øðrum verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónleik og tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, ið kann javnmetast við hesar listagreinir.

Stuðul verður latin umsøkjara við støði í verkevni ella verkætlan, sum lýkur krøvini í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins, § 1, og kunngerð um Mentanargrunn Landsins, sum seinast broytt við kunngerð nr. 2 frá 6. januar 2025, og sum nevndin í Mentanargrunninum metir hava listalig ella faklig dygdareyðkenni.

Nevndin ger sjálv av, hvørjar umsóknir verða stuðlaðar, og hvussu stórur stuðul skal verða játtaður í hvørjum einstøkum føri. Siðvenja er, at stuðul verður ikki latin almennum stovnum ella almennum partafeløgum, grunnum, o.tíl.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin frágreiðing, eftir at tiltakið er av, tó í seinasta lagi 1. apríl eftir játtanarárið. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn. Gongur verkætlanin yvir fleiri ár, verður frágreiðing at meta sum ávegis frágreiðing, sum verður latin Mentanargrunninum á hvørjum ári.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin roknskap eftir hesum reglum:

Roknskapir, har játtanin er 50.000 kr. og upp til 100.000 kr., skulu hava átekning.
Áteknaður roknskapur krevur, at ein uttanveltaður persónur váttar, at roknskapurin er settur upp sambært fyriliggjandi skjølum.

Roknskapir, har játtanin er 100.000 kr. ella meir, skulu verða grannskoðaðir.
Grannskoðaður roknskapur krevur at verða grannskoðaður av góðkendum grannskoðara, og at avritið av grannskoðanarprotokollini er hjálagt.

Stuðul verður latin eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins, á umsóknarblað grunsins.

**Eftirmeting**
**§ 10.**

Starvsskipan fyri Mentanargrunn Landsins og virksemi grunsins verður at eftirmeta triðja hvørt ár eftir áheitan frá forfólkinum.

Nevndin ásetir gjøllari reglur fyri virksemi sítt í starvsskipan, ið skal góðkennast av landsstýrisfólkinum.

Tá nýggjar uppgávur verða latnar grunninum verður starvsskipanin eftirmett og dagførd tilsvarandi.

**Alment**
**§ 11.**

Viðvíkjandi ógegni og tagnarskyldu eru vanligu reglurnar um málsviðgerð í almennu umsitingini galdandi.

Endurskoðað av nevndini fyri Mentanargrunn Landsins 15. desember 2025.

Hedvig Westerlund-Kapnas, forfólk

Ivan H. Niclasen, næstforfólk

Brynhild Næs Petersen, nevndarlimur

Kinna Poulsen, nevndarlimur

Nicolaj Falck, varalimur

Góðkent av landsstýrisfólkinum

Dagfesting: 2. 2. 2026

Navn: